

## Kavi í Týsklandi

Tað er synd at siga, at tað hevur verið serliga summarligt í týska landspartinum Bayern tað seinasta samdøgrið. Uppi á teimum hægstu fjøllunum er rættiliga nógvur kavi komin niður, og niðri á láglendinum er gloprarregn og vatnflóð. Týska veðurstovan sigur, at ovast á fjallinum Zugspitze eru meiri enn 60 centimetrar av kava komin niður teir seinastu 24 tímarnar, soleiðis at nú er kavin har næstan tríggjar metrar tjúkkur. Niðri í dølunum hevur tað regnað so illa, at eftir einum samdøgri regnaði tað 70 centimetrar. Tað hevur gjørt, at fleiri áir eru farnar upp um áarbakkarnar við tí úrsliti, at vatnflóð er í fleiri bygdum og býum, skrivar týska tíðindastovan DPA.

## Ísland sum Búlgaría og Kasakstan

Íslendski ríkiskassin verður ikki mettur serliga tryggur sum lántakari. Heimasíðan hjá Íslandsbankanum skrivar, at sum lántakari á altjóða fíggjarmarknaðinum er Ísland nú í bólki saman við londum sum Bulgaria, Kasakhstan, Ungarn og Kroatia. Sagt verður, at fyri bara nøkrum mánaðum síðani varð Ísland mett sum tryggur lántakari, men at støðan er broytt sera nógv teir seinastu mánaðirnar. Ísland er nú í bólki saman vbið londum, sum hava tørv á fíggjarligari hjálp uttaneftir fyri at vinna á búskaparkreppuni, og tað setir Ísland í bólk við londum sum Serbia, Ukraina og Moldova, skrivar Íslandsbankin. Hesi londini hava eins og Ísland biðið Altjóða Gjaldoyragrunnin IMF um hjálp.

# Sorgardagur á Skálafjørðinum



*Skála Skipasmiðja letur nú aftur, og hetta kemur illa við hjá Runavíkar Kommunu, ið longu hevur minkandi skattainntøkur*

*Savnsmynd*

**Í gjár fingu 30 starvsfólk á Skipasmiðjuni á Skála at vita, at tey ikki longur hava eitt arbeiði. Grundarlag er ikki longur fyri virksemi á Skála Skipasmiðju, sum tí letur aftur. Hetta kemur illa við hjá kommununi, staðfestir borgarstjórin**

UPPSAGNIR
*Rógvi Nybo*
*Rogvi@sosialurin.fo*

Tað vóru eini brádlig og keðilig tíðindi, Portalurin bar borgarstjóranum í Runavíkar Kommunu, Magnus Rasmussen, í morgun, tá tað var greitt at skipasmiðjan á Skála letur aftur.

- Hetta kemur óvart á meg. Skattainntøkurnar hava verið minkandi, og hetta kemur illa við, staðfestir Magnus Rasmussen, borgarstjóri.

Á skipasmiðjuni á Skála hevur nógv arbeiði verið til tíðir og minni til tíðir, men borgarstjórin er ikki í iva um, at virksemið har hevur havt stóra ávirkan á allan Skálafjørðin.

- Taka vit inntøkurnar fyri teir fyrstu fimm mánaðirnar og rokna fram, so koma 7 milliónir at mangla í, eftir verandi fíggjarlóg. Vit hava verið inni og hugt eftir hesum, og royna sum frægast at spara. Men hetta bøtir ikki um støðuna, staðfestir borgarstjórin í Runavíkar Kommunu, Magnus Rasmussen.

- Vit fingu at vita, at einki var at gera, og at skipasmiðjan mátti lata aftur. Tað segði Jóhannus Berthelsen, formaður í Skála Handverkarafelag, við Dimmalætting í morgun.

### Niðurgongdin støðug

20. januar í ár var ein onnur sparirunda hjá MEST á Skála, tá 10 fólk vóru uppsøgd, og tvey verkfrøðingastørv ikki vórðu sett aftur. Hetta kom eftir at virksemið var minkað, eftir at seinasti nýbygningurin varð latin eigarunum í fjør. Talan var um nýggja Thor Omega.

Tá segði Eyðfinn Egholm, stjóri á MEST, at eingin nýggj verkætlan við nýbygningum var í umbúna, og at tey tí fóru at royna at styrkja kjarnuvirksemið, sum er umvælingar og viðlíkahald av skipum.

Hetta hevur eftir øllum at døma ikki eydnast nóg væl, og tí letur MEST skipasmiðjuna á Skála nú aftur.

Eyðfinn Egholm, stjóri á MEST, er eftir øllum at døma uttanlands í løtuni, og er tískil ikki at hitta. Heldur ikki Mouritz Mohr, ið er rakstrarleiðari á Skipasmiðjuni á Skála, var at hitta áðrenn evstamark.

# Barnakarnevalur við Margáir

**Fríggjadagin verður ítróttaøkið við Margáir í Streymnesi, í samband við at rørsluár er, karmur um stóran barnakarneval. Fyrireikararnir vænta sera nógv fólk, og øll børnini í Sundalagnum eru boðin**

RØRSLA
*Rógvi Nybo*
*Rogvi@sosialurin.fo*

Dagstovnurin við Kráir í Hvalvík og barna- og ungdómsdeildin hjá EB-Streymi skipa fríggjadagin 26. juni fyri barnakarnevali við Margáir frá klokkan 15 til 20. Tiltakið er fyri øll børn í Sundalagnum og familjur teirra.

Tað verður ítróttarøkið við Margáir, sum verður karmur um stóra Barnakarnevalin. Fyriskipararnir hava sett nógv á skránna til tiltakið.

Inni á økinum verður undirhald á stóra pallinum, sum verður settur upp, djóraframsýning, hoppiborgir og ymsar kappingar. Eisini hava tey fingið sjúkrabil, politibil og sløkkiliðsbil at luttaka, sum børnini so kunnu síggja. Eisini vera aðrir stórir bilar og maskinur við.

Fleiri forkunnugar framførslur verða eisini á pallinum. Nósi, Bassi og Silvi koma á vitjan, og tað, at Rørsluár er, kemur eisini at seta sín dám á tiltakið. Eisini verður klovnurin Bobo við, og síðst, men ikki minst, Faroe5, ið fara at syngja og dansa. Hetta verður aftaná klokkan 17.

Tað verða allir dagstovnarnir í Sunda kommunu, sum fara at hittast til hetta tiltakið, og er talan tá um hundraðtals børn. Tey fara saman at byrja tiltakið, tá tey klokkan 15 hittast við Kráir, har dagstovnurin í Hvalvík liggur, og fara í skrúðgongu, við Norðljómi á odda, fram til Margáir.